


## Hár fyri lívið!

**HOTEL HAFNIA (Parnassið)**
Leygardagin 5. mars 05
&
Sunnudagin 6. mars 05
kl. 12.00 - 19.00

**SJÓMANSHEIMIÐ Í KLAKSVÍK**
Mánadagin 7. mars 05
kl. 12.00 - 17.00

**"STUTT & GREITT" Á STRONDUM**
Týsdagin 8. mars 05
kl. 12.00 - 16.00

Vinarliga ring og bilegg tíð
á fart. +45 40 50 32 11

So havi eg aftur kós móti Føroyum við nýggjum, alternativum hári, ið tolir vask:

'Hár fyri lívið' er eitt nýtt og kollveltandi slag av hári, ið kann nýtast av kvinnum og monnum í øllum aldri. Her er einki minni enn avloysarin fyri toupeir og parykkar!

Hárparturin verður settur fastur í húðina í 4 vikur í senn við einum kremi, ið verður smurt á høvdið. Hárið situr fast alt tíðarskeiðið og skal bert hava dagliga røkt, eins og vanligt hár. 'Hár fyri lívið' er framleitt av ektaðum hári, við einum serstakliga tunnum botni. Fyrimunirnir eru fleiri; umframt at tað kennist sum títt egna hár, gevur tað møguleika fyri at velja frisuru, sum tær lystir; hárið kann vaskast og brúsast so ofta tær lystir og í mun til undanfarin sløg av hári, eru eingir kantar, sum síggjast og skulu goymast.

Hárslagið verður selt sum ein skipan og umframt mánaðarligu tænastuna, er útskifting av hárpartinum uml. 4. hvønn mánaða íroknað. Soleiðis tryggjar tú tær, at hárið altíð er sum tað eigur at vera og ikki nær at verða slitið, áðrenn næsti hárparturin er klárur.

Ring til mín og lat okkum avtala eina tíð, har tú kanst hoyra nærri um nýggju hárskipanina...

*Vinarliga*
*Henning Toftild (fart. +45 40 50 32 11)*



**Budolfi Plads 9 · 9000 Aalborg · Tel +45 98 10 32 11**

**www.parykker.dk**


www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



### Stuðulsfólka-skipanin

- er ein partur av sosialu deild í kommununi. Hon hevur egna umsiting og er skipað í tvær deildir:

**Serdeildin** tekur sær av børnum á dagstovni við varandi breki, menningartarni og líknandi.

**Familjudeildin** tekur sær av børnum 0-18 ár, sum hava aðrar trupulleikar.

Starvsfólk verða sett í starv í stuðulsliðnum og fáa eina ella fleiri uppgávur.

Arbeiðið gongur vanliga fyri seg á dagstovni ella frítíðarskúla og kann t.d. verða at stuðla einum ella fleiri børnum sum:
- hava talu- ella samskiftistrupulleikar
- ikki trívast ella mennast aldurssvarandi
- hava trupulleikar í sosiala samanspælinum
- hava DAMP ella SI-trupulleikar ella
- eru rørslu- ella menningartarnaði

- onnur leys størv?
Hygg á
www.torshavn.fo

## Stuðlar til Stuðulsfólkaskipanina
### - í Tórshavnar kommunu

Søkt verður eftir fólki til Serdeildina at byrja 1. apríl 2005 ella eftir nærri avtalu. Arbeiðstíð eftir avtalu.

**Størvini**
- Eitt starv er 15 t/v hjá barni í frítíðarskúla, har arbeiðið verður at skapa forútsigiligheit og stuðla undir í sosiala samspælinum.
- Eitt starv er 25 t/v hjá barnagarðsbarni, har arbeiðið verður at menna málsliga og sosiala førleikan.

Eisini eru aðrar uppgávur á veg, har tímatalið ikki er ásett enn.
Søkt verður eisini eftir føstum avloysara.

**Vit kunnu bjóða**
áhugaverd og mennandi størv, har tú arbeiðir sjálvstøðugt, men er partur av einari skipan við grundbólkum, starvsfólkamenning og einum pedagogiskum ráðgeva. Møguleiki er eisini fyri Marte meo-ráðgeving.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava námsfrøðiliga ella aðra hóskandi útbúgving, og verður dentur lagdur á:
- at tú hevur royndir við børnum innan tað pedagogiska arbeiðsøki.
- at tú hevur hug og evni at arbeiða við børnum, sum hava serligan tørv.
- at tú ert búgvin, kann arbeiða sjálvstøðugt og ert jalig/ur fyri menning í arbeiðnum.

**Starvs- og setanarviðurskifti**
Størvini kunnu vera full- ella parttíð og verða lønt sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag ella møguliga annað avvarandi yrkisfelag, Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið. Skipað verður fyri ráðgeving, kollegialari supervisión og skeiðvirksemi.

**Meiri fæst at vita**
við at venda sær til Trønd Ennistíg, pedagogiskur ráðgevi, ella Birgit Debess, leiðari fyri Stuðulsfólkaskipanina, tlf. 30 20 10.

**Umsókn**
saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skulu vera Tórshavnar kommunu, Postrúm 32, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mánadagin 14. mars 2005. Viðmerkið umsóknina "Stuðulsfólkaskipanin".





FØROYAPRENT
www.foroyaprent.fo · Tel. 314 555 · Fax 318 026






Sosialurin
Box 76 • 110 Tórshavn • Tel. 341 800 • Fax 341 801 • www.sosialurin.fo